Árni Gregersen, programleiðari á SvF:

Onga falska kanning gjørt


SJÓNVARP FØROYA:

GER FALSKA KANNING

Sjónvarp Føroya gongur rættiliga langt fyri at »prógva«, at teirra [illegible] hava ein størri hyggjaraskara enn t.d. Scansat, BF [illegible] á sø[illegible] ið[illegible] úð[illegible]

OYGGJATÍÐINDI:

ELSKAÐ OG HATAÐ

- Tað er ringt, sjálvt við einari objektivari kanning, at fáa fólk at viðganga at tey lesa Oyggjatíðindi, men eg meti, at 80 prosent av øllum avislesarum í landinum, hava lisið blaðið eina ella fleiri ferðir, sigur ein royndir samfelagseygleiðari, sum leggur afturat at Oyggjatíðindi hevur verið so nógv mest umtalaða blað millum manna seinastu árini.

TOPP ?

6 Oyggjatíðindi - Mikudagur 11. desember 1991 nr. 95

EINGIN TRÝR KANNINGINI Í SVF:

OYGGJATÍÐINDI Í TOPPINUM

Soleiðis málbera nógvir føroyingar seg, eftir at SvF almannakunngjørdi eina »kanning« um føroysku bløðini. Kioskeigarar kring alt landi siga, at kanningin er langt frá veruleikanum. Sambært teimum so er ringt at siga, um tað er Oyggjatíðindi ella

Tríggjar av yvirskriftunum úr Oyggjatíðindum, sum vit endurprenta her, so tey sera mongu, ið hvørki lesa ella síggja blaðið, her kunnu síggja, hvussu Oyggjatíðindi roynir at lýsa kanningina, ið als ikki varð gjørd av SvF, men av handilsskúlanæmingum fyri Hjalgrím Samuelsen, sum brúkar kanningina í sambandi við lestur.

Oyggjatíðindi gera rættiliga nógv burturúr áhugaverdu kanningini, SvF almannakunngjørdi í farnu viku, ið umframt at innihalda ein hóp av upplýsingum viðvíkjandi sjónvarpi í Føroyum, eisini viðgjørdi ta útbreiðslu føroysku bløðini hava.

Sambært hesa kanning var Dimmalætting framvegis nógv størsta blað, og henni á baki komu so Sosialurin, Dagblaðið og síðani allaraftast Oyggjatíðindi av tíðindabløðunum, ið koma út millum tvær og fimm ferðir um vikuna.

Spjarra tøl saman

Í blaðnum føra Oyggjatíðindi fram, at kanning er følsk, og at teir við einari sjálvgjørdari telefonkanning skulu hava funnið fram til, hvussu stór bløðini í veruleikanum eru í mun til hvørt annað.

Hendan av Oyggjatíðindum sjálvgjørda kanning spjarrar saman nøkur tøl, ið skulu siga, at Dimmalætting, Sosialurin og Oyggjatíðindi eru tey mest seldu bløðini í 14 av teimum »bestu« kioskunum kring landið.

Við øðrum orðum tykjast Oyggjatíðindi at hava misskilt kanningina, tí har varð ikki talan um, hvussu nógv bløð vórðu seld ella keypt, men hvussu nógv vórðu lisin. Og har er víður munur á.

Hevði ikki lisið Oyggjatíðindi

Sosialurin hevur annars vent sær til Árna Gregersen, programleiðara á Sjónvarpi Føroya, fyri at fáa eina viðmerking frá honum til skrivingina í Oyggjatíðindum um at talan skal vera um eina falska kanning.

»Skriva Oyggjatíðindi tað?« er fyrsta viðmerkingin frá programleiðaranum, ið sigur, at hann ikki hevur lisið Oyggjatíðindi, og tí heldur ikki veit av, hvat skrivað er har um kanningina. »Eg eri nevniliga ein av teimum, ið bert komi fram á blaðið viðhvørt.«

Beint øvugt

Men annars avsannar hann, at kanningin er følsk ella umbiðin av Sjónvarpi Føroya:

»Tað er beint øvugt, tí Hjalgrím Samuelsen, sum lesur til cand. merc. heitti á okkum um at hjálpa sær við eini kanning, sum hann skuldi gera í sambandi við lesturin, og tað lovaðu vit honum,« sigur Árni Gregersen. »Okkara partur umfatar hvørki spurningarnar ella nakran annan tílíkan part av kanningini, men bert at fáa sett tølini í talvur og at løna teimum handilsskúlanæmingunum, sum hava ringt runt til fólk hesi fimm kvøldini í november.«

Tað var nevniliga so, at serflokkurin HHs á Føroya Handilsskúla varð biðin um at ringja til fólk fimm sjónvarpskvøld og seta teimum spurningarnar.

Væl umboðandi

Spurnarbløðini hevði Hjalgrím Samuelsen sjálvur gjørt, og játtaðu tveir av handilsskúlalærarunum at taka kanningina við í undirvísingina fyri at nýta hana sum dømi um teori og praksis.

»Fyri at fáa eina so eftirfarandi kanning sum gjørligt, varð gjørt av at fáa fatur á umleið 800 fólkum, og eydnaðist at tosa við 790, so ikki kann sigast annað, enn at kanningin er umboðandi,« sigur Árni Gregersen.

Ringt varð til 1.295 fólk, og av hesum svaraðu sum sagt hesi 790, ið svara til 61 %. Tey spurdu vórðu tilvildarliga útvald eftir endasifrum á telefonnummørum, og skuldu vera eldri enn 13 ár.

Øll øki í Føroyum vórðu eisini væl umboðað, og bert í Eysturoynni og í Norðoyggjum var ein lítil munur á teimum spurdu óg fólkatalinum. T.v.s. at eitt sindur fleiri norðoyingar og eitt sindur færri eysturoyingar eru við í kanningini, enn fólkatalið í prosentum vildi givið.

hj.

Heimkomið til jóla...

...hópin av nýggjum klæðum til hansara...



★ Klædningar
★ Frakkar
★ Skinnjakkar
★ Stuttir klædningsjakkar og buksur, ið hóska til
★ Stórt úrval av vindjakkum, stuttir og síðir
★ Bosweel skjúrtur
★ B.H.I. undirklæðir
★ Ambassadør pyjamas

...og annars alt einum mannfólki tørvar uppá kroppin.

Altíð vælklæddur í klæðum frá

P/f hjá KISSA Tórshavn

Tlf. 11395

ALT TIL MANNFÓLK...

Tíðindaskriv frá Amnesty International

Hesi vunnu!

Drigið varð á dómaraskrivstovuni 10. des.

1. vinningur: Ferð fyri tvey til Florida frá Faroe Travel **nr. 50732**
2. vinningur: 1000 litrar av olju frá Shell **nr. 38022**
3. vinningur: 1000 litrar av olju frá Statoil **nr. 64160**

Vinnararnir hava fingið boð.

Undirtøkan hevur verið sera góð og vit takka hjartaliga fyri stuðulin.

Amnesty International Føroya Deild

Lívdin, Dj. í Geilsgøtu 1

Nú er opið soleiðis:
fríggjakvøld og leygarkvøld frá kl. 19.00 til 01.00, og sunnukvøld frá kl. 19.00 til 23.00.
Frá 1. januar er aldursmarkið 16 ár.